ítróttur

Nr. 55 • fríggjadagur • 19. mars 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

# Jákup stórtrívist í OB

**Føroyski landsliðsleikarin, Jákup á Borg, stórtrívist í nýggja felagi sínum, OB, hóast tað er truplari at koma á liðið, enn hann hevði væntað**

FÓTBÓLTUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Jákup á Borg hevur syrgt fyri nógvum yvirskriftum í føroysku fjølmiðlunum í vetur. Í november mánaða bleiv bumban slept, tá ið kunngjørt var, at Jákup skifti frá B36 til arvafíggindan HB, og fyri stuttum gjørdu HB og danska felagið OB leigusáttmála um Jákup, uttan at nakar miðil hevði varhugan av tí.



*Føroyski landsliðsleikarin, Jákup á Borg, stórtrívist í danska felagnum OB, men hann ásannar tó, at kappingin um plássini er harðari enn hann hevði væntað*

*Savnsmynd*

### Sera væl móttikin

Jákup hevur nú verið í danska felagnum í tvær vikur. Í telefonini úr Danmark sigur Jákup á Borg, at hann er sera væl móttikin í felagnum, og hann hevur fingið nógva hjálp til at koma upp á pláss.

Fyrstu tíðina búði Jákup á einum gistingarhúsi í Odense, men fyri fáum døgum síðani útvegaði OB honum eini hús, ið hann og familjan kunnu búgva í, so leingi OB leigar Jákup frá HB. Í sambandi við at Jákup hevur fingið eini hús at búgva í, er familjan hjá honum eisini komin til Danmarkar. Fyrr í vikuni komu tey bæði, unnustan Sussie og sonurin Fríði, niður, so nú er alt perfekt, sigur Jákup á Borg. Húsini hoyra til gistingarhúsið, ið Jákup búði á, og tað er so mikið gott, at um tað treingir til at gerast reint, skulu tey bara ringja á gistingarhúsið, so kemur reingerðarfólk at gera tað.

### Trupult at koma á liðið

Mánadagin leikti Jákup við á eykaliðnum hjá OB, sum spældi dyst móti Viborg. Dysturin endaði við javnleiki 2-2, og Jákup spældi allan dystin. Fyrstu 65 minuttirnar leikti Jákup á høgra bakki, sum er eitt heldur óvanligt pláss hjá honum at leika á, og teir seinastu 25 minuttirnar leikti Jákup á sínum vanliga plássi høgru megin á miðvøllinum.

Jákup sigur, at eftir hansara tykki gekk tað rættuliga væl at leika á høgra bakki, men tá ið hann var fluttur niðan á miðjuna at leika, var orkan so smátt farin at ganga undan, og tí gekk tað ikki eins væl á miðjuni, sum tað gekk á bakkinum. Jákup heldur, at støðið í donsku danmarksseriuni, har eykaliðið hjá OB leikar til dagligt, er rættuliga høgt. Í dystinum mánadagin høvdu bæði OB og Viborg nógvar spælarar úr superligahópinum á liðnum, og tí var støðið í tí dystinum ógvuliga høgt, helst hægri enn í 1. deild í Føroyum, sigur Jákup á Borg.

Hørð kapping er um plássini í OB, og Jákup ásannar, at tað er truplari at koma á liðið, enn hann hevði væntað. Venjarin hjá OB, Troels Bech, hevur sína fastu byrjunaruppstilling, og til dystirnar hevur hann einans tríggjar eykamenn við. Vanliga eru tað ein verjuleikari, ein miðvallarleikari og ein áleyppari, sigur Jákup og leggur afturat, at hann berjist saman við einum trimum øðrum um plássið sum eyka miðvallaleikari. Jákup heldur tó, at eftir dystin mánadagin er kanska eisini ein møguleiki fyri at sleppa at royna seg á bakkinum, tí har hevur OB ikki nakra beinleiðis gardering fyri veteranin Steen Nedergaard, ið eigur tað plássið.

### Andin er ikki tann sami

Jákup venur fótbólt hvønn dag í vikuni við undantaki av mikudegi, tá ið teir hava frí. Týsdagar og hósdag verður vant bæði fyrrapart og seinnapart, og tað er rættuliga strævið,sigur Jákup á Borg. Enn eri eg ikki heilt á hædd við hinar, hvat viðvíkur venjingarstøði, men tað er nær við,s igur Jákup á Borg, sum tó heldur, at tað hevur gingið heilt ótrúliga væl til venjingarnar. Venjingarnar eru harðar, og menn spara seg als ikki til venjing, tí tað ræður um at vísa venjaranum, hvør dugur er í einum, sigur Jákup.

Eitt saknar Jákup tó í sambandi við venjingarnar, og tað er andin í umklæðingarrúminum, soleiðis sum hann kennir tað úr Føroyum. Í Føroyum verður tað altíð skemtað og spælt hund í umklæðingarrúminum, meðan tað her niðri er ein heilt annar andi, har menn eru meiri tigandi og ikki koma hvørjum øðrum so nær, sigur Jákup á Borg. Ikki tí, teir allarflestu eru ógvuliga blíðir og fyrikomandi, og til dømis eru tað nógvir, ið bjóða seg fram at koyra meg heim eftir venjing, sigur føroyski landsliðsleikarin.

### Neyvan við móti Brøndby

OB fekk eina frálíka byrjan upp á seinnu helvt av kappingini í superligaini, tá ið liðið sunnudagin á heimavølli vann 4-0 á FC Midtjylland, og komandi vikuskifti er tað oddaliðið Brøndby, ið kemur á vitjan í Odense. Brøndby hinvegin fekk ein serstakliga vánaliga byrjan, tá ið teir sunnudagin á heimavølli taptu heili 1-6 móti hinum oddaliðnum úr Esbjerg. Hetta var størsti ósigur hjá Brøndby á heimavølli í 27 ár!

Jákup á Borg væntar ikki, at pláss verður fyri honum í hópinum hjá OB til dystin móti Brøndby, men tað er als ikki nakað vónbrot fyri unga havnarmannin. Hann ætlar sær bara at hanga í til venjing, og so er bara at taka av møguleikanum, tá ið hann einaferð kemur, sigur føroyski landsliðsleikarin í OB.

## Formansvalið allarhelst útsett

**Nógv bendir á, at valið av nýggjum formanni til Fótbóltssamband Føroya enn einaferð verður útsett**

FORMANSVAL
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Sum umrøtt her í blaðnum fyrr í vikuni, hevur Fótbóltssamband Føroya nýggjan aðalfund leygardagin, har eitt av málunum er val av formanni. Á seinasta aðalfundi bleiv formansvalið útsett, tí Dánjal Andreasen hevði trekt seg sum valevni, og Frithleif Olsen var tískil einasta valevni. Nú er støðan hin sama, tí Óli Holm, ið bleiv skotin upp sum valevni til formanssessin eftir aðalfundin í februar, er nú einasta valevni, eftir at Frithleif Olsen fyrr í vikuni tók seg aftur sum valevni. Óli Holm er gamal í garði innan FSF, og tí var væntandi, at hann fór at fáa stóra undirtøku millum feløgini, men nú er líkt til, at formansvalið enn einaferð verður útsett.

### KÍ væntar útsetan

Í viðtalu við Norðlýsið sigur næstformaðurin í starvsnevndini hjá KÍ, Karl Birgir Isaksen, at hann væntar formansvalið verður útsett. Støðan er tann sama sum undan seinasta funi, og tí vænti eg, at feløgini fara at taka somu avgerð sum seinast, sigur Karl Birgir Isaksen við Norðlýsið.

Karl Birgir Isaksen sigur við Norðlýsið, at á seinasta aðalfundi gjørdi sonur Óla Holm (formaðurin í VB John Henrik Holm blðm.) greitt, at feløgini vóru í tí keðiligu støðu, at eitt av valevnunum til formanssessin hevði trekt seg, eftir at tíðarfreistin til at skjóta upp valevni til formanssessin var farin, og tí var neyðugt, at nýggjur fundur var ásettur. Tískil væntar Karl Birgir Isaksen, at hetta sjónarmið fer at standa við, og at valið verður útsett, so at feløgini fáa til at skjóta upp ella góðtaka verandi uppskot til formanssessin.



# Flogbóltsfinala á Kambsdali leygardagin

**Lagt er upp til eitt brak av einum dysti, tá ið oddaliðini bæði í føroyskum mansflogbólti, ÍF og Mjølnir, hittast í seinasta umfari í landskappingini á Kambsdali leygardagin. Vinnandi liðið verður føroyameistari**

FLOGBÓLTUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Sjáldan hevur spenningurin verið so stórur undan seinasta umfari í føroysku flogbóltskappingini, sum hann er í ár. Bæði hjá kvinnum og monnum er einki avgjørt, men meðan tað hjá kvinnunum er rættuliga upplagt, hvør ið fer avstað við gullinum, er tað trupult at spáa um, hvør fer avstað við gullinum í mansdeildini.




### Nógvir áskoðarar til flogbólt á Kambsdali

Um alt gongur, soleiðis sum klaksvíkingar vilja hava tað, so koma tvey føroyameistarasteyp til Klaksvíkar leygardagin, meðan fuglfirðingar fegnir vildu, at annað steypið bleiv verandi í Fuglafirði.

Dysturin millum ÍF og Mjølnir er tann fjórði í ár millum liðini, og Mjølnir hevur vunnið tvær ferðir, meðan fuglfirðingar hava vunnið tann eina dystin. Fyrsti dysturin í ár endaði við einum 3-0 sigri til klaksvíkingar, tann næsti við einum 3-0 sigri til fuglfirðingar, og seinasti dysturin millum liðini, ið var leiktur í Klaksvík, endaði við einum 3-2 sigri til Mjølnir, eftir at ÍF hevði verið á odda 2-0!

Í Fuglafirði er stórur áhugi fyri flogbóltinum, og vanliga er rættuliga fitt av fólki til heimadystirnar hjá ÍF í høllini á Kambsdali. Tá ið so talan er um ein dyst, har ið meistaraheitið verður avgjørt, er rættuliga sannlíkt, at fuglfirðingar fara at møta manssterkir til dystin. Áskoðarafjøldin hjá ÍF kann verða rættuliga litrík við nógvum skiltum, trummum og øðrum, ið kann seta sín dám á karmarnar til dystin. Eitt gott dømi um hetta var steypafinalan hjá monnum í síðsta mánaða, tá ið fuglfirðingarnar vóru greitt við yvirlutan bæði á vøllinum og á áskoðaraplássunum.

Hinvegin eru eisini nógvir klaksvíkingar væntandi. Ikki bara tí at menninir skulu spæla dyst um meistaraheitið, men eisini tí at kvinnurnar gera tað sama. Klaksvíkingar eru vanligani eisini rættuliga trúgvir móti sínum ítróttarfólki, bæði innan flogbólt, hondbólt og fótbólt, so teir møta óivað eisini manssterkir á Kambsdali leygardagin.

### Kvinnurnar hjá Mjølnir eru stórfavorittar

Tað skal verða løgið, um kvinnurnar hjá Mjølnir ikki gerast føroyameistarar leygardagin. Tær skulu eins og menninir leika ímóti ÍF á Kambsdali, og vinna tær dystin, eru tær meistarar.

Mjølnir hevur verið rættuliga sannførandi hjá kvinnunum seinastu tíðina, og tað er ikki nógv, ið bendir á, at kvinnurnar hjá ÍF fara at gera nakað við Mjølnir. Einasta liðið, ið kann hótta Mjølnir, eru steypavinnararnir úr TB, men fyri at tær skulu gerast meistarar, skal Mjølnir tapa móti ÍF, samstundis sum TB sjálvara skulu vinna sín dyst.

Nógv kjak hevur verið um dømingina í føroyskum flogbólti í vetur, og flogbóltssambandið hevur fingið nógvar ákoyringar fyri hetta, og stór ónøgd hevur verið millum leikarar og venjarar. Tí hevur FBF sett royndar dómarar til allar teir týðandu dystirnar seinastu umførini í landskappingini í flogbólti, og til dystirnar á Kambsdali leygardagin verða tað okkara fremstu flogbóltsdómarar, Tummas Óli Mortensen og Jan Hentze, ið fara at døma, so har skuldi ikki verið nakað at fílst á.

Dysturin millum kvinnuliðini hjá ÍF og Mjølnir verður á Kambsdali klokkan 2 leygardagin, og mansdysturin millum somu feløg verður klokkan 4.

# Fuglfirðingar eru meiri sigursvandir

**Ein av veteranunum á mansliðnum hjá Mjølnir er Trygvi Poulsen. Hann væntar ein sera spennandi dyst leygardagin við nógvum áskoðarum, men hann heldur fuglfirðingar hava ein fyrimun við tað, at teir eru meiri sigursvandir enn klaksvíkingarnir**

FLOGBÓLTSBRAK
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Trygvi Poulsen hevur spælt í meistaradeildini í flogbólti í fleiri enn 15 ár, so hann hevur roynt eitt sindur av hvørjum. Hjá honum er tað ikki nakað óvanligt at spæla avgerandi dystir, har til dømis føroyameistaraheitið stendur upp á spæl, men tað sama kann ikki sigast um nógvar av liðfeløgum hansara.

### ÍF fleiri royndir frá avgerandi dystum

Trygvi Poulsen sigur, at eftir hansara tykki hevur ÍF ein fyrimun, av tí at teir hava verið við frammi í oddinum seinastu mongu árini, og tí hava leikararnir hjá fuglfirðingum nógv fleiri royndir frá avgerandi dystir, enn hvat leikararnir hjá Mjølnir hava.

Mjølnir hevur ikki verið eins nógv við frammi í oddinum í seinastuni, sum teir onkuntíð áður hava verið, og tí hava teirra leikarar ikki tær nógvu royndir frá slíkum dystum, sigur Trygvi Poulsen.

Í Klaksvík eru allir mans hjá Mjølnir tøkir til dystin leygardagin, og Trygvi sigur, at allir eru øgiliga spentir til dystin, og at menn gleða seg til at spæla móti fuglfirðingum. Hann sigur tað altíð verða serliga stuttligt við slíkum dystum, og tað krevur eisini nógv at verða við í oddinum í føroyskum flogbólti í dag, tí støðið er hækkað munandi síðstu árini, sigur Trygvi Poulsen. Hann heldur tað serliga verða teir mongu útlendingarnir, ið hava gjørt føroysku kappingina sterkari, og hann vónar ikki, at tað verður settur fótur fyri, at feløgini í framtíðini eisini kunnu hava útlendskar leikarar.

Um dystin leygardagin sigur Trygvi Poulsen, at eftir hansara tykki verður tað vinnandi liðið tað lið, ið rakar dagsformin leygardagin. ÍF og Mjølnir eru tvey ógvuliga jøvn lið, men gongur tað gott hjá okkum, eru vit ikki lættir at taka, sigur Trygvi Poulsen, men leggur tó afturat, at ÍF kanska er eitt meira stabilt lið enn Mjølnir, og tað kann eisini verða ein fyrimunur hjá teimum.

Veteranurin í Mjølnir væntar nógv fólk úr Klaksvík á Kambsdali leygardagin, og Mjølnir fer at skipa fyri bussferð til gulldystirnar. Fólk í Klaksvík koma vanliga manssterk til slíkar dystir, sigur Trygvi Poulsen, og leygardagin verður neyvan nakað undantak.

## Rokna við 500 áskoðarum

**Liðskiparin hjá ÍF, Bartal Eliasen, er sera spentur upp á gulldystin móti Mjølnir leygardagin, og hann væntar at áskoðaratalið fer at tátta upp í móti 500**

FLOGBÓLTSBRAK
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Hann hevur roynt tað so mangan áður, bæði í flogbólti og fótbólti, Bartal Eliasen, men spenningurin er eins stórur hvørja ferð.

### Heimavøllurin einki at siga

Bartal Eliasen sigur, at hjá ÍF eru allir mans tøkir til dystin leygardagin, og teir eru ógvuliga uppsettir upp á at endurvinna gullið og harvið ogna sær greipuna. Hann heldur ikki, at tað er nakar fyrimunur hjá ÍF, at teir hava heimavøll, tí eftir hansara tykki hevur heimavøllur lítið og einki at siga í flogbólti.

Um dystin leygardagin sigur Bartal annars, at hann er púra opin, tí tað eru tvey ógvuliga jøvn lið, ið hittast. ÍF hevur kanska ein lítlan fyrimun við tað, at teir hava helst ein breiðari hóp enn Mjølnir, og vit spæla sjáldan illa, sigur Bartal Eliasen, sum tó leggur afturat, at hann væntar dagsformurin fer at avgerða, hvør ið fer avstað við meistaraheitinum.

Í Fuglafirði eru fólk sera spent til dystin, og ÍF hevur eisini roynt at lýsa eitt sindur við dystinum. Bartal sigur, at tað ber næstan ikki til at fara út millum fólk, uttan at tey spyrja til dystin leygardagin, og hvussu man væntar, at tað fer at ganga. Flogbóltsliðið hjá ÍF er, saman við svimjingini, stoltleikin hjá býnum, og av tí sama eru fuglfirðingar ógvuliga trúfastir til heimadystirnar á Kambsdali, og leygardagin verður neyvan nakað undantak í so máta.